# St. Margaret's kirkjan

Angeliska kirkjan St. Margaret í Westminster liggur í Westminster Abbey á Parliament Square og er sóknarkirkjan hjá British Houses of Parliament í London. Hon er halgað Magraret av Antioch. Upprunaliga grundað í 12. øld av benediktaramunkum fyri at fólk, sum búðu kring økið við Abbey kundu fara til gudstænastu í egnari sóknarkirkju. St. Margaret's var endurbygd frá 1486 til 1523. Hon gjørdist sóknarkirkja fyri Palace of Westminster í 1614, tá purutanarnir í 17. øld, ónøgdir við háhalga Abbey, valdu at halda parliamentalska gudstænastu í meiri hóskandi St. Margaret's, nakað sum hevur hildið sær fram til dagin í dag.

Landnyrðingstornið var endurreist av John James frá 1734 til 1738. Samstundis var allur bygningurin fjaldur handan Portland grót. Bæði estaru og vestaru inngongdirnar vóru bygdar seinni av J. L. Pearson. Innrætningurin var í stóran mun umvældur og broyttur til verandi líki av Sir George Gilbert Scott í 1877. Kirkjan er eisini vorðin kend fyri »celeb«-giftarmál sum tey hjá Samuel Pepys og Sir Winston Churchill. Kirkjan er eitt World Heritage Site.






















